# Fyribyrgjandi viðlíkahald av virkjum og skipum



*P/F ES Ídnaðartøkni hevur lagt seg eftir at bjóða viðskiftafólki eina heildarloysn innan fyribyrgjandi viðlíkahald.*
*- Málið er at tryggja viðskiftafólki eina tryggari, effektivari og bíligari framleiðslu, sigur felagið.*
*Mynd (tilvildarlig): Vilmund Jacobsen*

**- Fyribyrgjandi viðlíkahald er ikki nógv frammi í Føroyum, hóast peningur er at spara, og hetta somuleiðis bøtir munandi um trygdina á arbeiðsplássum.**

**Hetta vil P/F ES Ídnaðartøkni, sum vil tryggja viðskiftafólki eina tryggari, effektivari og bíligari framleiðslu, gera nakað við**

INNSENT TILFAR
*Redigering: Vilmund Jacobsen*

Felagið hevur fingið til vega eitt sonevnt termografi kamera og vibratiónsmátiútgerð, sum kann siga, í hvørjum standi ein maskina ella eitt el-kervi er í. Nógvir møguleikar eru við hesi útgerð, og eitt nú ber eisini til at finna veikleikar við bjálving og staðfesta fukttreingjan.

Men hvussu kann so peningur sparast, og hvussu kann økjast um trygdina við hesi útgerð?

- Jú, við útgerðini kunnu feilir staðfestast, áðrenn ein maskina ella el-kervi fer í knús. Soleiðis kunnu umvælingarnar gerast, áðrenn skaði stendst, bæði á útgerðina og møguliga á fólk sum arbeiða við hesi útgerð.

ES Ídnaðartøkni sigur, at nógvur peningur er eisini at spara, tá ið tú kanst tilrættaleggja, nær útbúnaðurin skal umvælast.

- Steðgar ein maskina í eini framleiðslu, steðgar oftast øll framleiðslan. Hetta kann gerast sera kostnaðarmikið. Fyri tað fyrsta skal útgerðin umvælast beinanvegin. Tað merkir ofta, at arbeitt verður um kvøldarnar og næturnar, eykalutir skulu fáast til vega, og ofta mugu hesir koma stundisliga heim úr útlandinum. Aðrar avleiðingar kunnu vera, at virki t.d. ikki megnar at levera sína vøru til keypararnar til tíðina og fiskur, sum liggur inni á virkinum, kann spillast. Tímalønt arbeiðsmegi bíðar eftir umvælingini, og í ringasta føri kunnu fólk koma til skaða, tí neyðuga viðlíkahaldsarbeiði ikki er gjørt. Eisini kann skaði standast á bygning, skip ella aðra útgerð.

ES Ídnaðartøkni vísir á, at høvdu virkir ella skip frammanundan vitað av brekinum og vitað, hvussu long lívitíðin var, kundu tey havt tilrættalagt umvælingina í góðari tíð.

- Tá kundu tey havt bílagt eykalutir, um umvælingin kundi verið framd, meðan framleiðslan lá still kortini. Var talan um eina størri umvæling, sum lá fyri framman, kundu virkir ella skip havt biðið um tilboð uppá arbeiði.

Sum nevnt, kunnu tólini hjá ES Ídnaðartøkni eisini nýtast til at staðfesta, um nakar dugur er í bjálving.

- Tá ið talan er um bjálving, er hetta ikki ein feilur, sum knappliga ger seg galdandi. Tá er tað meira tann framhaldandi missurin av orku, sum kostar pening. Talan kann vera um upphiting av húsum og virkjum, har nógvur hiti fer til spillis, tí bjálving vantar - er vorðin vát, er dottin niður ella bara ikki er rætt sett upp. Sama ger seg galdandi við fyrsti-og kuldagoymslum, har hitin bert ferðast hinvegin, sigur felagið.

Og lagt verður aftrat:

- Tað, at broyta temperaturin í einum rúmi, antin tað er at hita ella køla rúmið, er sera orkukrevjandi og harvið eisini kostnaðarmikið; tí er bjálvingin av stórum týdningi. Hetta ger seg sjálvandi eisini galdandi í vanligum sethúsum.

ES Ídnaðartøkni sigur, at í stuttum er eitt termografi kamera eitt tól, ið kann konvertera ella broyta infrareyðar strálur til visuelt ljós.

- Alt materiali, flótandi ella gas, hevur eina termiska orku í sær. Henda orka vil altíð flyta seg frá heitum til kalt. Á yvirflatuni á hesum materialum fer ein stráling av temperaturi fram. Henda stráling vil eisini altíð verða í tí infrareyða økinum á elektromagnetiska skalanum. Hetta merkir, at vit kunnu ikki síggja hana við eygunum.

Síðan tekur felagið eitt drívhús ella vakstrarhús sum dømi.

- Sólarljós, sum vit síggja, kemur inn ígjøgnum glasið í drívhúsinum.

Ljósið rakar ymiskar lutir og plantur inni í húsinum. Hesir lutir gerast heitir av ljósinum og senda infrareyðar strálir, sum vit ikki síggja, frá sær. Men infrareyðar strálir kunnu ikki ferðast gjøgnum glas eins og ljós. Tær verða tí speglaðar inn aftur í rúmið, sum harvið gerst heitari og heitari. Soleiðis fáa vit sonevndu, drívhúsmegina.

Men hvar kann hetta so nýtast — og svarið hevur ES Ídnaðartøkni:

- Allastaðni, har vit yvirføra orku, vil ein partur av orkuni ”blíva burtur”. Hetta skal tó skiljast soleiðis, at orka kann sjálvandi ikki blíva burtur, tí orka kann hvørki skapast ella oyðileggjast! Hetta viðførir so, at tann orka, vit yvirføra og sum ikki kemur fram, verður til aðra orku. Innan maskinur og el verður orkan til hita ella termiska orku, sum tað verður rópt. Við at hyggja at, hvar hendan termiska orka kemur fram, ber til at staðfesta, um hetta er ein byrjandi feilur ella ikki. Tað krevst tó, at tú veitst, hvat tað er, tú hyggur at. Við øðrum orðum er neyðugt, at tú skilir funktiónina á tí, sum verður kannað, tí øll mekanisk og elektrisk útgerð hava eina sonevnda ”virkningsgrad”. Tað er, at ein partur av orkuni, sum verður nýtt, fer til spillis og kemur fram sum termisk orka.

Vibratiónsanalysa verður nýtt til at kanna maskinur við roterandi rørslum.

- Við at máta ristingarnar á eini maskinu og síðan hyggja at frekvensunum á vibratiónunum, kann avgerast, hvaðani hesar ristingar stava. Á sama hátt sum við termografi, ræður um at skilja, hvat tað er, tú hyggur at, tí øll maskinarí geva ristingar frá sær. Við at hyggja, á hvørjum frekvensi hesar vibratiónir liggja, ber til at staðfesta, hvaðani tær stava. Talan kann t.d. vera um oyðiløgd leiði, skeiva upprætting, feilur í koplingini, ov stórt trýst á reimum, vantandi smyrjing ella ov nógv smyrjing, sigur ES Ídnaðartøkni, sum hevur lagt seg eftir at bjóða viðskiftafólki eina heildarloysn innan fyribyrgjandi viðlíkahald.

Hetta verður sum nevnt gjørt við termografi, vibratiónsanalysu og lincolnsmyrjiskipanum til virkir, skip og stovnar.

P/F ES Ídnaðartøkni er eisini SKF-umboð í Føroyum.

- Málið hjá okkum er at tryggja viðskiftafólki eina tryggari, effektivari og bíligari framleiðslu — til gagns fyri øll, sigur felagið.







Sjóvinnur krevja álítandi og framkomnar samskiftismøguleikar. Skipanir, ið virka og eru lættar at brúka.

Vinnudeildin hjá Føroya Tele bjóðar eina røð av tænastum og loysnum frá heimsins fremstu framleiðarum.

Ein landsumfatandi tænastuskipan, ið er grundað á drúgvar royndir, ger okkum før fyri at bjóða alheims tøkni til føroyskar sjóvinnur.

- Digitalar- og IP vekslarar og tilhoyrandi tænastur
- Dátusamskifti og heimaarbeiðspláss
- Breiðband | ADSL
- Fylgisveinasamskifti

Fá meira at vita um møguleikarnar frá Vinnudeildini á telefon 30 30 30

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum


Eurest Føroyar:

## Góðar royndir av oljuvinnuni

**–Royndirnar higartil í oljuvinnuni hava verið væl eydnaðar, og vit hava nú uppbygt eina servitan, sum vit eisini fara at bjóða fram í framtíðar boringum í føroyskum øki, sigur Høgni Hansen, stjóri fyri Eurest Føroyar, ið fæst við catering til oljuvinnuna**

VINNA
*Heri á Rógvi*

Ein av fyritøkunum, sum við oljuvinnuni hevur víðkað um sítt virkisøki, er P/F Poul Hansen heilsøla.

Tá oljuvinnan byrjaði at banka uppá í Føroyum valdi fyritøkan at royna at sleppa upp í part.

Ógvuliga natúrligt fyri eina heilsølu valdi Poul Hansen at royna eydnuna í catering vinnuni.

Catering á oljuboripallum og boriskipum snýr seg um alla matgerð og alla reingerð umborð.

–Vit mettu, at hetta kundi vera áhugavert fyri okkum, og vit leitaðu tískil eftir einum samstarvsfelaga. Vit gjørdu eina avtalu við Eurest, og saman við teimum settu vit á stovn Eurest Føroyar, sigur Høgni Hansen, stjóri fyri Poul Hansen og Eurest Føroyar.

Eurest er partur av Compass Group, ið er heimsins størsta fyritøka innanfyri matvørutænastur.

### Sovereign Explorer

Bæði Statoil og Amerada Hess valdu til sínar boringar á summri 2002 at nýta Eurest Føroyar til at taka sær av catering í sambandi við royndarboringar. Bæði feløgini nýttu riggin Sovereign Explorer.

Til ta uppgávuna nýtti Eurest Føroyar átjan fólk. Hesi vóru so í liðini við níggju í hvørjum tvær vikur heima og tvær vikur úti.

Teimum royndunum, ið Eurest og Poul Hansen hava gjørt sær, letur Høgni Hansen væl at.

–Vit meta tíðina vera sera væl eydnaða. Oljufeløgini seta strong krøv, men higartil hevur tað ikki verið nakar trupulleiki at fyrihalda okkum til hesi, sigur Høgni Hansen.

Oljufeløgini seta strong krøv til góðsku og ikki minst til trygd, sigur Høgni.

Øll starvsfólkini hjá Eurest Føroyar hava verið á trygdarskeiði, soleiðis at tey lúka øll krøv. Somuleiðis eru allar treytir, sum eru galdandi fyri at arbeiða umborð, eisini galdandi fyri starvsfólk innan catering.

### 5 fólk í Danmark

Síðani summarið 2001 hava ongar boringar verið á føroyskum øki. Eures Føroyar er kortini ikki meira í dvala enn, at fimm starvsfólk í løtuni arbeiða innan catering í donskum øki.

–Vit hava klárað at uppbygt okkum eina servitan, og hesi vilja vit halda við líka. Tí hava vit roynt at fingið okkara fólk í starv aðrastaðni, tá eingin aktivitetur er í Føroyum, sigur Høgni Hansen.

Nú líkt er til, at farið verður aftur undir at bora komandi summar, so roknar Høgni eisini vist, at Eurest fer at bjóða seg fram sum ein møguligan veitara.


Your Job on the Sea
- is our Job in the Air



Atlantic Airways is the national airline of the Faroe Islands. At present we provide a domestic helicopter service but are gearing up to serve the coming offshore industry. We are ready when you are. If you would like more information, please contact us.

ATLANTIC AIRWAYS
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo